## TIT SPYRJA VIT SVARA



*Bergur Hanusson, djóralækni* · *Heri Joensen, prestur* · *Heri Kragesteen, sálarfrøðingur* · *Ingi Højgaard, løgfrøðingur* · *Jens Andreassen, lækni* · *Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur* · *Jón Klein Olsen, politistur* · *Jón Kragesteen. Ferðslutrygd* · *Julianna Næs, pedagogur* · *Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi* · *Turid Thomsen, lestrarvegleiðari* · *Marius Staksberg, málfrøðingur*

LÆKNIN

### 42 ár og við barn

Eg eri ein 42 ára gomul kvinna, sum er vorðin við barn. Eg vil fegin vita, hvørjir møguleikar eru fyri at fáa fostrið kannað. Eg havi hoyrt um fosturvatnsroynd. Kann eg fáa eina slíka framda í Føroyum, og hvat verður kannað tá? Og er vandi fyri at abortera stórur?

Havi eisini hoyrt um aðrar kanningar, ið konur yvir 40 ár við barn fara til Danmarkar at fáa gjørdar. Hvørjar eru hesar kanningar og skal ein sjálv rinda fyri ferðina? Hvat verður kannað og hvussu stórur er møguleikin fyri at missa fostrið?

Av tí, at eg eri komin í uml. 6 viku, vil eg fegin hava svar beinanvegin. Nær verða slíkar kanningar gjørdar – í hvørji viku?

*Umframt vanligu kanningarnar hjá tínum lækna, hjá jarðarmóður og hjá burðarfrøðingi verður í summum førum eisini bjóðað kvinnuni fosturvatnskanning, um hon ynskir tað. Og tað er sjálvandi fyri at vita, um fostrið hevur okkurt kromosombrek, sum kvinnan ynskir at fáa kunnleika um. Við hesi royndini verður fosturvatn sogið út, og fríttflótandi fosturkyknur, sum fylgja við, kannaðar fyri ymsar kromosomsjúkur, eins og eisini fosturvatnið verður kannað nærri, og her hevur eitt ávíst lívfrøðiligt evni (alfa-føtoprotein) serligan áhuga.*

*Hendan royndin, sum best fer fram í 15.-16. viku, roknað frá síðstu menstruatións 1. degi, verður gjørd í Føroyum, og er eins trygg her og í Danmark. Abortvandin er umleið hálvt %.*

*Tað er rætt, at summar kvinnur fara niður til Danmarkar at fáa gjørt eina líknandi kanning longu í 10. viku. Vit kunnu nevniliga fáa nøkulunda somu upplýsingar sum omanfyri (undantikið alfa-føtoprotein), men bert eitt sindur skjótari, um vit kanna kyknurnar í eftirburðinum. Hesar verða drignar út við eini sera tunnari nál eins og við fosturvatnskanningini. Læknin, sum undir kanningini arbeiðir við einum háteknologiskum ultraljóðstóli, fylgir alla tíðina við á einum skíggja og sær, hvat hann ger.*

*Vandin fyri abort er her tann sami sum við vanligari fosturvatnsroynd hálvt %.*

*Um burðarfrøðingurin heldur, tað er átrokandi, at fostrið so tíðliga sum møguligt fær diagnosticerað eitt álvarsligt brek, so rindar Heilsuverkið allar útreiðslurnar til hesa kanningina. Tað kundi t.d. verið hjá kvinnu, sum er tungt disponerað til onkra álvarsliga arvaliga sjúku ella áður hevur føtt barn við álvarsligum breki, sum helst skal staðfestast skjótast til ber. Í øðrum førum, har bert kvinnan hevur áhuga í kanningini, ber hetta til, men so má hon sjálv rinda ferðaseðilin og vistarhaldið.*

*At enda skal nevnast møguleikin at kanna sjálva kvinnuna við eini blóðroynd, ein sonevnd tripple-test, har 3 ymisk evni (alfa-føtoprotein, HCG og østriol) verða mett í 14.-16. viku. Hetta eru evni framleidd í fostrinum og eftirburðinum. Alt eftir, hvussu nógv er av hvørjum av hesum evnum í blóðinum, kann ein rokna út vandan fyri, at fostrið hevur eina ávísa kromosomsjúku ella er álvarsamt vanskapt. Fyrimunurin við hesi kanningini er eitt skjótt svar (fáar dagar) í mun til kanningarnar omanfyri, har ein skal bíða 2 til 4 vikur.*

*Generelt eru tað serliga kvinnur omanfyri 35 ára aldur, sum hava tørv á at fáa preciserað vandan fyri breki, tí tað er í hesum aldursbólki, at títtleikin av vanskaping økist, jú eldri tær gerast.*

FØÐSLU- OG HÚSARHALDSFRØÐINGURIN

### Latið børn vera við í matgerð

Eg havi ringt við at fáa børn míni at eta grønt. Hevur tú nøkur góð ráð ella uppskriftir soleiðis at eta fái tey at eta meiri grønmeti?

*Tað vísir seg ofta, at børn eru sera varin við at royna nakað nýtt. Svarið man ofta fær sum foreldur, um ein nýggjur rættur sær dagsins ljós, er mær dámar ikki. Hetta at broyta vanar er nakað, ið tekur tíð, og sum ikki gerst frá einum dagi til annan. Tí er tað umráðandi at fara spakuliga fram. Besti mátin at broyta matvanarnar hjá børnum er at lata tey verða meira við í matgerðini heima. Tað vísir seg nevnliga, at um børn hjálpa til í køkinum, so fáa tey ein størri kunnleika til tær ymisku rávørurnar og hava eisini betri hug at royna tað, tey sjálvi hava gjørt. Sjálvt um tað kanska tekur eitt sindur longri tíð at hava børnini við, so vísir ein kanning, sum Veterinær- og Fødevaredirektoratet gjørdi í 1995 um matvanar í Danmark, at tilkomin sum høvdu stóran áhuga í at gera sunnan mat, eisini vóru við í matgerðini sum børn.*

*Kundi kanska byrjað við at gera matpakkarnar hjá børnunum eitt sindur meira áhugaverdar, pynta breyðið við eitt sindur av grønmeti, skera gularøtur og agurk í stavar og pakka inn í smáar pakkar.*

DJÓRALÆKNIN

### Hashhundurin ikki ávirkaður

Er tað satt, at hashhundurin hjá løgregluni er ávirkaður av hashi? Um hann ikki er tað, hvussu kann hann so lukta hash?

*Hashhundurin hjá løgregluni er ikki ávirkaður av hashi, hvørki tá hann er í arbeiði ella tá hann hevur frí. Hundar hava yvirhøvur sera góð evni at tevja seg fram til og skilja ímillum lukt av ymiskum slagi. Tað er tó ilt at meta um, hvussu gott snoddið er á hundi í mun til hjá fólki. Tað eru tær olfaktorisku kyknurnar í nasarovuni hjá hundi sum gera, at hann kennir lukt. Kanningar vísa, at talið á hesum kyknum er umleið 20 ferðir so stórt sum hjá fólki. Sjálvt um hundurin er sera væl útgjørdur frá náttúruni, er tó neyðugt at venja hann til at kenna luktin aftur, og ikki minst at læra hann at skilja serstakan lukt, til dømis av hashi, frá øðrum lukti. Hash og onnur rúsandi evnir verða ofta krógvað saman við ramliga luktandi evnum, sum til dømis olju, pipari, rotnandi matvøru ella kaffigróni, men væl vandir løgregluhundar hava ikki trupulleikar at finna hettar kortini.*

*Løgregluhundarnir verða eisini nýttir til at finna annað enn hash. Til dømis onnur rúsandi evnir sum kokain, amfetamin og heroin, vápn og krút, burturblivin fólk, kjøtvørur við marknaeftirlit og mangt annað.*

PRESTUR

### Hvør var Jason

Vónandi kanst tú svara mær uppá henda spurning skjótast gjørligt, tí hetta er ógvuliga vigtigt fyri meg. Í Apostlasøguni stendur skrivað um ein Jason í kap. 7 vers 5, 6, 7 og 9. Kanst tú siga mær, hvør hann var, bakgrund og annað?

*Ikki er annað vitað um hendan Jason enn tað, sum her er sagt – Apostlasøgan 17. kap. Í Tessaloníki var hann vertur hjá Paulusi og sýndi blíðskap. Helst hevur hann verið Jødakristin, jødi, sum nýliga hevði tikið trúgv á Jesus Kristus. Jason var eitt vanligt mannafólkanavn í grikska menningarheiminum, uppkallað eftir einari hetju í teirra fornu gudalæru. Hildið er tó, at Jason upprunaliga var jødi. Lættari var fyri jødar, ið búðu uttanfyri Ísrael at bera tey nøvn, ið nýtt vóru har á staðnum, nøvn, ið tó sipaðu til jødisk nøvn. Her minnir Jason t.d. á Josva.*

FERÐSLUTRYGD

### Ferðslutálmar muna væl

Eg havi sæð, hvussu væl bungur ella ferðsluforðingar rigga í bygdini á Velbastað. Hvat verður gjørt fyri at ávirka aðrar bygdir og kommunur at gera bungur á bygdavegunum eins og tey á Velbastað hava gjørt? Høvdu vit ikki kunnað verða nógvar vanlukkur fyriuttan, um fleiri ferðsluforðingar vórðu í bygdum øki kring alt landið? Og kunnu tit her í blaðnum koma við nøvnum á bygdum, har tit halda myndugleikarnir áttu at sett upp ferðsluforðingar sum bungur. Og hvør kann taka stig til, at slíkar bungur koma – fólkið, bygdaráðslimir, løgreglan, Ráðið fyri Ferðslutrygd?

*Í fyrsta lagi skal eg siga, at tað eisini er mín fatan, at ferðsluforðingarnar, ella rættari sagt ferðslutálmarnir, sum eru gjørdir í bygdini á Velbastað, rigga væl. Teir gera, at ferðin á bilunum fer munandi niður og kanska eisini, at bilar – óneyðugt – koyra í gjøgnum bygdina, teir nýta heldur landsvegin omanfyri.*

*Tað er ikki vanligt, at Ferðslutrygd vendir sær beinleiðis til bygdir ella kommunur fyri at fáa tær at gera ferðslutálmar her og har. Hinvegin hevur Ferðslutrygd, eftir áheitan, í fleiri førum verið uppí, tá ið slík viðurskifti hava verið á skránni. Men í sambandi við Null-hugsjónina, sum Ferðslutrygd hevur sett sær fyri at arbeiða við, kann væntast, at Ferðslutrygd kemur at hava ein sjónligari leiklut í slíkum málum. M.a. tí at tað í Null-hugsjónini liggur frammaliga at fáa ferðsluumhvørvið í bygdum øki tryggari, og tað sum oftast við, at ferðin verður sett niður, har vandi er fyri, at bilar kunna renna á fólk, sum eru til gongu millum hús, til handils osfr. Og sigast má, at her liggur nógv á láni, tí at ov lítið hevur verið hugsað um fólk til gongu, ella á súkklu, tá ið vegir eru gjørdir í Føroyum.*

*Um Ferðslutrygd skal gera lista við nøvnum á bygdum, sum eiga at gera ferðslutálmar, hevur eingin viðgerð verið um, og tí finst heldur eingin slíkur í løtuni.*

*Hvør kann so taka stig til, at ferðslutálmar verða gjørdir? Fyrst mugu vit sláa fast, at tað er tann, sum eigur vegin vegamyndugleikin, ið hevur avgerðarrættin, m.a. tí at tað er hann, sum skal gjalda fyri broytingarnar, sum skulu verða gjørdar. Er talan um vegir millum bygdir, er Landsverkfrøðingurin vegamyndugleikin, er tað í bygdum øki, er tað kommunan. Í summum førum kann vera talan um privatar eigarar, men tað er sjáldan. Politiið hevur ábyrgdina av, at lógir og reglur verða fylgdar, t.d. hvar skelti verða sett upp, strikur í vegnnum osfr. Er politiið og vegamyndugleikin ikki samt um, hvat ið skal verða gjørt, er tað landsstýrismaðurin í ferðsluviðurskiftum, sum skal taka avgerðina.*

*Hevur tú ynski um at fáa okkurt gjørt, so at ferðin á bilinunum verður sett niður t.d. í grannalagnum, har tú býrt, er skilabest, at tú setur teg í samband við vegamyndugleikan á staðnum, t.d. ein býráðs- ella kommunustýrislim ella tú skrivar eitt brævt til teknisku nevnd. Verður tikið undir við tær á hesum støði, kanst tú hava vónir um, at ynski tíni verða gingin á møti. Verður ikki tikið undir við tínum sjónarmiðum, mást tú royna at nýta aðrar vegir, um tú framvegis vilt hava ynski tíni uppfylt. Royn at fáa fleiri við tær, savna undirskriftir, tosa við aðrar myndugleikar og stovnar (t.d. Ferðslutrygd), fá fjølmiðlarnar við. Hetta kann vera ein langur og stríggin vegur, sum kann krevja nógv av tær, um tú vilt náa á mál. Men hetta eru nú einaferð treytirnar í einum samfelag, har vit hava loyvi at hava ymiskar áskoðanir.*




*Úr myndarøð um sama evni, sum hevur verið á mjólkarpakkunum*

# ítróttur

Nr. 11 • mikudagur • 17. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Finalan á ólavsøku

**Gongst eftir ætlan, verður finalan um løgmanssteypið spæld á ólavsøku í ár**

STEYPAKAPPING

*Jákup Mørk*

Tá feløgini um vikuskiftið fara at fundast við FSF, er eitt av punktunum á dagsskránni leikdagar í 2001. Fyrst og fremst er tað sjálvsagt góðkenning av ætlaðu skránni fyri landskappingina, sum verður viðgjørd, men eisini skal finnast út av, hvussu spælast skal í kappingini um løgmanssteypið.

Millum ár og dag hava fleiri leikdagar verið royndir til finaludystin. Onkuntíð um heystið, onkuntíð beint eftir ólavsøku og nú í seinastuni sum punktum fyri fyrru kappingarhálvu.

Roynt var miðskeiðis í 80'unum at leggja finaludystin á ólavsøku, men tá settu havnarfeløgini og Tórshavnar Býráð seg ímóti, soleiðis at hetta varð av ongum ta ferðina.

Nú verður so ein nýggj roynd gjørd við hesum, og tað tykist meira sannlíkt, at royndin hesa ferð fer at eydnast.

### Ikki avgjørt

Torleif Sigurðsson, formaður í FSF, sigur við Sosialin, at enn er eingin endalig avgerð tikin, men at arbeitt verður fram ímóti, at finaludysturin skal spælast á ólavsøku í ár.

– Arbeiðið er enn ikki komið somikið langt, at nøkur støða verður tikin á fundinum við feløgini, men tey verða sjálvsagt kunnað á fundinum, sigur Torleif. Sjálvur roknar hann tó við, at ætlanin verður veruleiki, men vísir á, at tað enn eru nógvir smálutir, sum skulu fáast upp á pláss.

– Talan er um bæði ítróttalig og fíggjarlig viðurskifti, sum skulu fáast upp á pláss. Tað hevur jú verið soleiðis, at havnarfeløgini hava havt rætt til fíggjarliga ágóðan av ólavsøkudystinum, meðan FSF á hinari síðu hevur havt rætt til inntøkurnar frá fjórðings-, hálv- og finaludystunum.

– Tí er í fyrstu atløgu neyðugt, at Tórshavnar Býráð ógyldar gomlu samtyktina um, at havnarfeløgini eiga ólavsøkudystirnar. Í øðrum lagi skul vit í FSF so koma ásamt við Tórsvøll um tey viðurskifti, sum umfata finaludystin, og í triðja lagi verður so helst neyðugt við eini avtalu millum Tórsvøll og havnarfeløgini, sum jú missa ágóðan av ólavsøkudystinum, sigur Torleif.

### Ítróttaliga virði

Annars eru tað helst fleiri, sum fegnast um, at finaludysturin skal spælast á ólavsøku.

Tað er jú eingin loyna, at tíðirnar í føroyskum fótbólti eru broyttar seinnu árini, og millum annað hevur hetta viðført eina devaluering av ólavsøkudystinum. Fyri bert fáum árum síðani var hetta ein av stóru dystunum á árinum fyri leikarar hjá havnarfeløgunum, men í dag stendur hesin ikki serliga ovarliga á dagsskránni. Altjóða uppgávurnar viga nógv meira í so máta, og tað hevur eisini víst seg, at tað gerst alt torførari at fáa lið til Havnar á ólavsøku. Í øllum førum um talan skal vera um lið í sterkastu uppstilling.

Spælararnir tykjast heldur ikki serliga áhugaðir í at spæla, og fleiri ferðir hevur verið funnist at, tá standurin á leikarunum ikki hevur verið hin besti, eftir eina kanska drúgva ólavsøkunátt.

Sum nevnt, so er eingin endalig støða tikin í málinum enn, men FSF formaðurin endar samrøðu okkara soleiðis:

– Talan verður allarhelst um eitt royndarár í ár, men tað er mín vón, at løgmaður, eftir at hava hildið ólavsøkurøðuna, kann spáka sær niðan á Tórsvøll, har hann fer at handa vinnaranum av finaludystinum løgmanssteypið.




*Í fjør leiktu GÍ og HB steypafinaluna, tá fyrra kappingarhálva endaði, men í ár skal finaludysturin ætlandi spælast á ólavsøku*

## Grand Prix í badminton

Leygadagin leiktu børn og ung eitt umfar í Grand-Prix kappingini í badminton. Kappast varð í Ítróttahøllini á Kambdsali, og verða úrslitini prentað niðanfyri

**Gentur upp til 11 ár**
1 Brynhild Carlsson HBF
2 Konni Kass Jacobsen HBF

**Dreingir upp til 11 ár**
1 Fríði Lamhauge HBF
2 Jan Ellingsgaard ÍF

**Gentur 11-13 ár**
1 Ulla í Dávastovu VÍF
2 Christina Ericsen VÍF

**Dreingir 11-13 ár**
1 Niclas Eysturoy HBF
2 Hilmar Kass Jacobsen HBF

**Gentur 13-15 ár**
1 Tanja Lið Johansen MBF
2 Anna Katrina Arge HBF

**Dreingir 13-15 ár**
1 Thomas Rubbeksen HBF
2 Gunnar Poulsen HBF

**Kvinnuunglingar**
1 Elin Hansen HBF
2 Ida Holm Berner HBF

**Mansunglingar**
1 Ragnar Isaksen VÍF
2 Sverri Ellingsgaard ÍF